# Sigldi fullur í Klaksvík

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Leygardagin út ímóti hálvgum seks fekk løgreglan fráboðan um, at ein sjónliga ávirkaður maður var á veg út í báti.

Løgreglan fór oman á bátabrúgvarnar, og har varð maðurin steðgaður, áðrenn hann hevði lagt frá landi. Maðurin átti bátin sjálvur og ætlaði sær at sigla út í Kalsoynna.

Hetta er brot á sjólógina, og maðurin verður ákærdur. Løgreglan tók blóðroynd av manninum, men enn er ikki greitt, hvussu stórt innihaldið av alkoholi var.

# Bátur fór á land á Skipanesi

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Leygarmorgunin sleit báturin Gadus, sum er heimahoyrandi á Toftum, meðan hann lá bundin á Skipanesi.

Gadus, sum er ein 20-tonsari, rak inneftir og fór á land einar 250 metrar longri inni á fjørðinum. Báturin fekk ikki stórvegis skaða. Eingin var umborð á bátinum, og Tjaldrið kom og tók Gadus avaftur. Sum skilst, so er hesin báturin ikki í drift longur, og báturin verður helst skrottaður skjótt.

Eitt ferðsluóhapp hendi henda sama morgunin. Ein maður koyrdi av Kambsdali til Fuglafirðar, tá tað eina hjólið punkterar. Førarin missir tamarhaldið á bilinum, sum endar í autoverjuni. Maðurin fekk ongan stórvegis skaða.

## Friðarligt í Havn

Løgreglan í Havn hevur havt eitt friðarligt vikuskifti. Tríggir bilførarar vórðu tiknir við kenning, og tríggir svóvu rúsin av sær á støðini.

# Maður lá undir røri á boripalli

**Sunnudagin hendi eitt arbeiðsóhapp á boripallinum Sovereign Explorer. Ein íri kom illa fyri, tá hann lá undir einum tungum røri, sum koppaði**

ARBEIÐSÓHAPP
*Stefan í Skorini*


*Ein 25 ára gamal íri varð sunnukvøldið fluttur á landssjúkrahúsið við hesi tyrluni, tá eitt tungt rør koppaði omaná hann*

Sunnudagin klokkan 15 komu boð av boripallinum hjá Amerada Hess til MRCC-støðina um eitt arbeiðsóhapp.

MRCC setti hjálpartiltøk í verk beinanvegin, og læknin hjá sjóverjuni, ein narkosulækni og ein sjúkrasystir vórðu send út við tyrlu at taka sær av manninum, sum er innlagdur á landssjúrkahúsinum. Læknarnir kundu tískil arbeiða uppá mannin á túrinum, sum tekur umleið ein tíma.

Tað var ein 25 ára gamal íri, sum arbeiðir á pallinum, ið fekk skaða, tá eitt rør koppaði omaná hann. Óhappið hendi, meðan arbeitt varð við at flyta ymiskt á dekkinum. Tað frættist, at maðurin hevur tað gott eftir umstøðunum.

## Kanna óhappið

Mánamorgunin fóru tríggir løgreglumenn og eitt umboð frá oljumálastýrinum út á boripallin at kanna umstøðurnar um óhappið. Løgreglan kannar øll arbeiðsóhapp og soleiðis er eisini í hesum førinum. Hetta sigur Jón Klein Olsen, støðleiðari. Menninir vóru ikki afturkomnir, tá vit tosaðu við løgregluna mánamorgunin, og tí kundu teir ikki siga meira nágreiniliga, hvat fór fram.

# Sosial árin frá oljuvinnu

OLJUVINNA OG ÁRIN
*Jan Müller*

Spurningurin um hvørji sosial árin ein oljuvinna kann hava á føroyska samfelagið er nú reistur á tingi. Løgtingskvinnan Anita á Fríðriksmørk hevur sett Eyðun Elttør, landsstýrismanni skrivligan fyrispurning um sosialu árinini av eini oljuvinnu. Hon spyr:

1. Hvussu nógv arbeiðsfólk kunnu væntast at brúk verður fyri, um so verður, at olja verður funnin?
2. Innan hvørji arbeiðs/fakøki kunnu hesi í høvuðsheitum væntast at verða bólkað?
3. Verður tørvur á innfluttari arbeiðsmegi?
* og um so er, hvussu nógvum? og
* hvat slag av arbeiðsfólki er tá serliga talan um?

3. Hvørji árin væntar landsstýrið, at oljuvinnan kemur at hava á húsamarknaðin í Føroyum?
4. Hvat heldur landsstýrið átti at verið gjørt frá politiskari síðu til tess at stýra húsamarknaðinum?
5. Hvørji hagtøl mangla vit til tess at fáa lýst støðuna og til tess at kunnu fylgja gongdini?

Í viðmerkingunum sigur tingkvinnan m.a. at kemur oljuvinnan til okkara, fer hetta uttan iva at fáa stór sosial árin á okkara samfelag. Vónirnar til eina komandi oljuvinnu hava longu sett gongd á tað avleidda virksemið, sum m.a. hevur verið við til at økt um fólkavøksturin og verið við til at eggja fólki og serliga føroyingum til at flutt heim til Føroya. Henda brádliga øking í fólkatalinum hevur elvt til rættiligt trýst á húsamarknaðin og húsaprísirnar, og tað er ikki óhugsandi, at júst hetta kann koma at vera við til at økja um stættarmunin í okkara samfelag sigur tingkvinnan víðari og hon heldur fram: -Familjur í høvuðsstaðum og við vanligum inntøkum og uttan serligan skattalætta, sum skulu til at seta føtur undir egið borð, kveppa seg við at keypa sær eini hús. Útboðið er so mikið lítið í mun til tann stóra eftirspurning, at tað endar altíð við, at prísirnir á sethúsum fara langt upp um virðið og upp um tað, sum vanligar inntøkur megna at gjalda. Hetta sama er galdandi fyri leigu av íbúðum/húsum.

## Alt fólkið við í menningini

Anita á Fríðriksmørk sigur víðari, at tað er umráðandi , at vit tryggja okkum, at alt føroya fólk verður við í menninngini av oljuvinnuni. Gera vit einki, er stórur vandi fyri, at nøkur fá fáa allan fyrimunin, og at gloppið millum tey múgvandi og tey lægst løntu verður enn størri. Og tá stýra vit eftir einum stættarmuni, sum er sera ódámligur og kann fáa ógvisligar sosialar avleiðingar fyri okkara samfelag. Hetta, tí tað verða tey væl fyrikomnu, sum koma at gera av, um húsaprísurin hækkar, um einsamallir uppihaldarar, og vanligar arbeiðsfamiljur koma at hava ráð at keypa sær eini vanlig hús, ella hava ráð at leiga sær eina vanliga íbúð. Og eru so eingir alternativir íbúðarmøguleikar, so verður torført hjá tí vanliga føroyinginum at fáa sær líkinda tak yvir høvdið.

Víðari verður sagt í viðmerkingunum, at landsstýrið átti at miðað eftir, at tey, sum hava tann størsta vinningin, eisini hava tær størstu meirútreiðslurnar. Soleiðis kundu við tryggja okkum, at partur av tí peningi, sum tað almenna fær fyri oljuvinnuna, verður til gagns fyri tey, sum frammanundan eru við sviðusoð. Eitt, sum er sera týdningarmikið, er, at ferð kemur á alternativar íbúðarmøguleikar; og at vit fáa skipaðan íbúðar- og leigupolitikk. Hetta fer at økja um útboðið og harvið lækka húsa- og leiguprísin, sum eru á einum órímiliga høgum støði í dag. Tá høvdu ungar barnafamiljur, einsamallir uppihaldarar, eldri hjún osfr. havt møguleika fyri at leiga sær eina íbúð, ella keypt sær eina partaíbúð, sum er á einum lutfalsliga rímiligum støði, og sum er fyri ein prís, sum er rímiligur fyri hesi fólkini.

## Keikanturin

Nomið verður eisini við spurningin um føroyskan keikant. Landsins myndugleikar hava sett krav um, at alt virksemi frá oljuvinnuni skal um føroyskan keikant. Hetta ynski var í hæddini fyri nøkrum fáum árum síðani, tá ið arbeiðsloysi var um 20%, men síðani er vend komin í, og arbeiðsloysi er nú komið niður á eini 3-5%. Og tað vil so aftur siga, at skal alt virksemi um føroyskan keikant, so eiga vit at gera okkum greitt, hvaðani hesi fólkini skulu koma. Skulu tey koma úr útlandinum, ella koma tey úr øðrum vinnugreinum her á landi, og um so verður, koma hesar vinnugreinir so ikki at mangla arbeiðsmegi. Hvussu er og ikki, so er umráðandi, at vit fáa at vita, hvat tað er fyri arbeiðsmegi, vit kunnu vænta, tørvur verður á, um tað er ófaklærd ella vælútbúgvið fólk, ella ein blandingur av báðum, og um vit hava hesi fólk í landinum, ella um vit mugu innflyta tey.

Tingkvinnan heldur tað annars hevði verið gott við neyvum data og hagtølum, sum lýsa støðuna í samfelagnum. Tá kundu vit fylgt gongdini frá nú av og í tíðini, meðan oljuvinnan mennir seg og gerst veruleiki. Tá høvdu landsins myndugleikar kunna fylgt gongdini og havt tøl fyri møguligum broytingum, sum ávirka sosialu broytingarnar í samfelagnum. Og soleiðis vita, hvørji tiltøk gerast neyðug. Og soleiðis eisini verið betur før fyri at vart okkum í móti væntaðum fløskuhálsum sigur Anita á Fríðriksmørk í viðmerkingum sínum.

(Í hesum sambandi kann nevnast, at spurningarnir, sum tingkvinnan her reisir, vórðu umrøddir i samrøðu, sum Sosialurin hevði við Randi Fredriksberg, cand. scient í geografi tann 7. og 8. september í ár. Blaðm.)

# ítróttur

Nr. 189 • týsdagur • 2. oktober 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# B68 skal hava danskan venjara


*Komandi kappingarárið fáa Súni Fríði og teir nýggjan venjara. Frank Skytte, sum áður hevur vant TB, hevur gjørt sáttmála við B68, og skal hann verða høvuðsvenjari hjá felagnum*

**Frank Skytte, sum hevur sagt venjarastarvið í Hvidovre frá sær, skal vera íblásari hjá øllum deildunum á Toftum**

VENJARI
*Jóannes Hansen*

B68 skal hava nýggjan venjara. Nýggi venjarin eitur Frank Skytte. Hann er í løtuni venjari hjá Óla Johannesen og Hvidovre, og hann er ikki ókendur í Føroyum. Tvær ferðir hevur hann verið venjari hjá TB. Fyrra ferðin var í 1982, og seinnaferðin var í 1995. Hetta seinna umfarið var hann venjari fimtan tey fyrstu umførini, so fór hann til hús. Venjarin og TB kundu ikki semjast um fíggjarligu treytirnar fyri samstarvið tey seinastu umførini, sum vórðu spæld eftir at sáttmálaskeiðið var liðugt.

## Meiri til ungdómin

Niclas Davidsen, formaður í B68, sigur, at teir hava avrátt við Frank Skytte, at hann skal hava høvuðsábyrgdina fyri allari venjingini í felagnum:

– Seinnu árini hava vit roynt at styrkt um arbeiðið í yngru deildunum. Fleiri av teimum, sum í áttati árunum vóru við til at manna besta liðið, hava saman við øðrum tilkomnum fólki, tikið lut í venjaraútbúgvingini, og í ár hava vit verið betri fyri við ungdómsvenjarum, enn vit kanska nakrantíð hava verið áður. Vit vilja fegin styrkja uppaftur meiri um ungdómsarbeiðið, og tí hava vit gjørt sáttmála við ein venjara, sum burturav fer at arbeiða hjá okkum. Hann skal venja 1. og 3. deild og møguliga okkurt annað lið. Harafturat skal hann hava samband við hinar venjararnar, sum skulu venja í samráð við nýggja venjaran. Vit eru spentir upp á hetta samstarvið, og kanningarnar, sum vit hava gjørt, siga okkum, at talan er um ein góðan og nógv avhildnan venjara.

Hava tit ikki verið nøgdir við arbeiðið, sum Jóannes Jakobsen hevur gjørt?

– Vit hava samstarvað við Jóannes í tvey ár. Úrslitini í bestu deildini hava verið góð, og vit hava verið væl nøgdir við arbeiðið hjá venjaranum. Men nú vildu vit hava ein nýggjan venjara, sum skal hava ábyrgdina av øllum deildunum, og tann venjaran halda vit okkum hava funnið.

## Gott ummæli

Tað er eingin loyna, at millum viðhaldsfólkini hjá B68 er tað framvegis soleiðis, at venjarin, sum teir framum allar aðrar minnast, er John Kramer. Hann hevði serliga gott tak á spælarunum, og hann hevði gott samband við alt fólkið í B68 og á Toftum. Við Krameri við róðrið eydnaðist tað B68 at vinna tvey FM heiti, og felagið endaði á heiðursmerkjaplássi øll tey fimm árini, sum John Kramer var á Toftum.

Tá vit hava spurt okkum fyri um nýggja venjaran, so er skoðsmálið, sum hann fær t. d. á Tvøroyri, ikki so langt frá tí, sum tey í B68 góvu John Kramer, sála. Tað var Frank Skytte, sum syrgdi fyri, at Óli Johannesen fekk sáttmála við Hvidovre, og liðformaðurin á landsliðnum hevur alt gott at bera nýggja B68 venjaranum.

Tá Frank Skytte í 1995 var á Tvøroyri, endaði TB á sjeynda plássinum. Teir vóru ikki serliga væl mannaðir, men við nógvum arbeiði og sera góðum íblástri frá venjaranum, megnaðu teir fram til summarsteðgin at stríða seg at vera við í toppinum. Summarsteðgurin hetta árið var eftir sjeynda umfarið, og tá høvdu HB og TB, sum lógu lið um lið í toppinum, sekstan stig í part. At Frank Skytte var ein ógvuliga prinsippfastur venjari kom m. a. til sjóndar aftaná jóansøku. Tá setti venjarin onkrar av stuðulsspælarunum á beinkin, tí teir ikki eitt hundrað prosent høvdu fylgt boðunum hjá venjaranum.

## Rýmir frá Schmeichel

Síðani Peter Schmeichel setti pengar í Hvidovre, hevur Frank Skytte verið venjari hjá liðnum í 1. deild. Hann hevur kortini ikki havt síðsta orðið, tá tað hevur snúð seg um at seta liðið og keypa spælarar. Tá hevur manager'in í felagnum, Jan Sørensen, tikið avgerðirnar.

Fyrr í summar ljóðaði, at Frank Skytte hevði longt samstarvið við Hvidovre í tvey ár afturat, men nú hevur hann sagt upp og fer frá felagnum, sum tað í síðstu viku varð sagt um, at tað er í fíggjarligum vandasjógvi. Í staðin fyri at arbeiða fyri Hvidovre og Peter Schmeichel, skal Frank Skytte nú vera venjari hjá Tofta Ítróttarfelag og Niclasi Davidsen!

B68 formaðurin sigur, at venjarin kemur tilFøroya 1. februar, tá teir aftur fara undir venjingarnar.

# VB riggar til

**Vágbingar eru longu nú í ferð við at leggja seinastu hond á leikarahópin til komandi kappingarárið**

LEIKARAR
*Jákup Mørk*

Fyri tveimum vikum síðani varð greitt, at VB komandi kappingarárið fer at hava ein jugoslaviskan venjara. Nú er so greitt, at umframt nýggjan venjara, fer VB komandi árið eisini at hava tilgongd av í minsta lagi einum og allar helst tveimum útlendskum leikarum.

Av heimasíðuni hjá VB framgongur, at felagið hevur skrivað sáttmála við 25 ára gamla jugoslavan, Slobodan Madzar, sum er miðvallarleikari, og higartil hevur roynt seg í næst bestu jugoslavisku deildini.

Í leikskránni til dystin móti B36 stóð eisini skrivað, at felagið í løtuni er í samráðingum við ein jugoslaviskan álopsleikara.

## Fimm útlendingar

Um so er, at sáttmáli eisini spyrst burtur úr samráðingunum við áleyparan, fer VB væntandi at hava fimm útlendskar leikarar í hópinum komandi kappingarárið.

Framman undan er nevnliga greitt, at Robert Cieslwicz og Predrag Zivkovic allir halda fram í felagnum, meðan vágbingar í løtuni arbeiða við at leingja sáttmálan hjá Marek Wiersbicki.

Reglurnar hjá FSF staðfesta, at feløg bert kunnu hava fýra útlendskar leikarar á liðnum, men Marek er tó ikki umfataður av hesum. Hann hevur nevnliga verið somikið leingi í Føroyum, at hann í fótbóltshøpi verður roknaður sum føroyingur.